## FC Amager spældi seg víðari

Við tveimum málum frá Kristoffer Wichmann og einum frá Anders Qvist vann FC Amager seg trygt víðari í donsku steypakappingini leygardagin. Teir vitjaðu í Allerød, og vunnu 3-0. Lyngby, við Henrik Larsen sum venjara, vann sær eisini víðari luttøku. Lyngby vann heili 4-1 á B93, men hvørki Tem Hansen ella Christian Holst vóru við vegna skaða.

## Arsenal manglar styrki

Leygardagin tapti Arsenal ímóti Fulham í Premier League, og tað var langt frá spælinum hjá Arsenal hendan dagin og til tað, sum teir eru kendir fyri seinastu árini. Ofta hava Fabregas, Hleb, Rosicky og Flamini mannað Arsenal-miðvøllin, men eingin spældi við um vikuskiftið. Flamini og Hleb eru seldir, og hinir báðir eru skaddir. Arsene Wenger segði eftir dystin, at veikleiki á miðvøllinum kostaði sigurin.

## Minsta landið í liðítróttafinalu

**Ísland er nógv tað minsta landið, sum hevur verið í eini finalu í einum endaspæli í liðítrótti.**

OL

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Kinesisku áskoðarnir yvirgóvu seg í hálvfinaluni millum Ísland og Spania. Fólkið frá Heimsins fólkaríkastu tjóð, sum sótu á áskoðaraplássunum í hondbóltshøllini róptu: ”Ísland Jia Yuu”, sum merkir ”Koyr á Ísland”. Íslendingar hava veruliga sett seg á heimskortið í dag. Og eftir, at hava kannað tað kann staðfestast, at Ísland er minsta tjóðin nakrantíð, sum hevur verið í eini finalu fyri A-landslið í einum endaspæli í liðítrótti. Sama um vit tosa um hondbólt, fótbólt, flogbólt, kurvabólt, landhokki, íshokki, vatnpolo, baseball ella softball. Litava hevur verið í nøkrum hálvfinalum í kurvabólti, og Uruguay hevur vunnið HM í fótbólti tvær ferðir, umframt, at Uruguay hevur verið í øðrum HM-hálvfinalum. Uruguay vann eisini OL-gull í fótbólti í 1924 og í 1928. Í Uruguay búgva 3.500.000 fólk, í Litava búgva 3.400.000 fólk, í Íslandi búgva 300.000 fólk. So talan er veruliga um nógv tað minstu tjóðina, sum hevur verið í einari finalu í einum endaspæli í liðítrótti. Tað verið seg OL, HM ella EM. Men stoltu og røsku íslendingarnir hava ikki latið seg tølað av íbúgvaratalinum, men hava í hondbólti havt tað, sum fasta slagorð sítt, at ”Vit eru 7 ímóti 7 á vøllinum”.

# Søguligt silvur til Ísland




*Franska yvirvaldið var ov stórt. Í finaluni mátti Ísland geva seg, men eftir stendur eitt ítróttarbragd av teimum heilt sjáldsomu*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Íslendingar vórðu stórliga fagnaðir eftir dystin, men teir formáddu sær ikki tað heilt stóra móti Fraklandi**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er fáur, sum kann muta ímóti, at Frakland tók hondbóltsgullið hjá monnum í OL.

Ísland, sum hevur tikið alt og øll á bóli í kappingini, stóð fyri síni størstu hondbóltsavbjóðing í søguni, men bitin var snøgt sagt ov stórur.

Tíðliga í fyrra hálvleiki streyk Frakland avstað, og so var sera avmarkað, hvat kundi gerast. Íslendski málverjin bjargaði 31%, meðan franski málverjin bjargaði heili 52% av skotunum.

Fagnaðurin um íslendska bragdið var ikki minni fyri tað. Klappsalvurnar rungaðu í høllini í Beijing, tá íslendsku hetjurnar fóru eftir sínum silvurmerkjum, ið verða mett sum størsta ítróttarbragd í íslendskari søgu.

### FAKTA um dystin

**Frakland-Ísland 28-23 (15-10)**
**Støður frá dystinum**: 1-0, 2-2, 2-3, 4-3, 8-4, 14-7 (15-10), 18-12, 21-12, 24-15, 25-17, 25-19, 27-22, 28-23
**Frakland**: Nikola Karabatic 8, Bertrand Gille 5, Cedric Burdet 4, Luc Abalo 4, Michael Guigou 3 (1), Daniel Narcisse 2, Olivier Girault 1 (1), Joel Abati 1.
Frakland fekk 28 mál burturúr 42 royndum, sum er 67%.
Frakland setti 2 av 2 brotskøstum í netið, sum er 100%.
Thierry Omeyer hevði eitt bjargingarprosent uppá 52%.
**Ísland**: Ólafur Stefansson 5, Arnór Atlason 4, Snorri Guðjónsson 4 (3), Guðjón Valur Sigurðsson 3, Logi Geirsson 3, Alexander Petersson 2, Sigfus Sigurðsson 1, Robert Gunnarsson 1.
Ìsland fekk 23 mál burturúr 49 royndum, sum er 47%. Ìsland setti 3 av 5 brotskøstum í netið, sum er 60%. Bjørgvin Páll Gústavsson hevði eitt bjargingarprosent uppá 31%
**Útvísingar**: Frakland 4, Ísland 3.

# Fjórða OL-heiðursmerkið

**Silvurheiðursmerki er tað fjórða olympiska heiðursmerki Íslands í søguni.**

OL

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað er ikki lætt hjá einari pinkutjóð at vinna olympisk heiðursmerki, men hendinga ferð eydnast tað tíbetur. Og ígjár var silvurheiðursmerki Íslands millum tey lukkuligu undantøkini. Hini trý olympisku heiðursmerkini hjá Íslandi hava øll verið í einstaklingaítrótti. Á olympisku summarleikunum í Melbourne í 1956 vann Vilhjálmur Einarsson silvurheiðursmerki í trístøkk. 28 ár gingu áðrenn Ísland vann heiðursmerki aftur. Á OL í Los Angeles vann Bjarni Fríðriksson bronsumerki í judo. Tá OL var í Sidney í 2000 vann Vala Flosadóttir bronsumerki í stangarlopi. Nú 8 ár seinni fáa íslendingar sítt fjórða OL-heiðursmerki. Vónandi verður tað eitt gullheiðursmerki! Fyrsti íslendingur ið tók lut á OL var Jóhannes Jósefsson, sum var glímari. Hann tók lut á olympisku leikunum í London í 1908, also fyri 100 árum síðani. Jóhannes Jósefson gjørdist tá nr. 4 í glíming.